LM-117/2023

Fylgiskjal 6

Fra: Poula á Líðarenda <Poula.a.Lidarenda@taks.fo>
Sendt: 19. april 2024 13:40
Til: VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>
Cc: Ragnfríð Nord Anthoniussen <RagnfridNordA@uvmr.fo>
Emne: Viðmerkingar til lógaruppskot um tøkugjald

Góðan dag

TAKS hevur fylgjandi viðmerkingar til lógaruppskotið um tøkugjald.

Viðvíkjandi § 6, mælir TAKS til at strikað orðingina "heruppií eisini uppgerðini av framleiðslukostnaðinum". Tað gevur ikki meining, at Taks skal hava eftirlit við framleiðslukostnaðinum, tá hetta er ein kostnaður sum verður ásettur av UVMR, eftir upplýsingum sum frá alifeløgunum verða send til UVMR, og sum er grundarlag undir tøkugjalds prosentinum. Tá Taks fremur eftirlit, so er tað eftir, at upplýsingar eru latnar og eftir at tøkugjalds prosentið er komið í gildi og tøkugjald kravt inn. Spurningurin er eisini, hvat skal henda, um Taks skuldi komið fram á at upplýsingar frá einum av alarunum eru skeivar ella ikki heilt fullfíggjaðar. Skal UVMR, so broyta framleiðslukostnaðin og harvið tøkugjalds prosentið afturvirkandi ? Í so fall skulu broytingar gerast afturvirkandi hjá øllum alarum, hóast hesir hava gjørt upp eftir galdandi reglum. Reint fyrisitingarligt kann hetta hava avbjóðingar við sær. Viðvíkjandi sjálvum tøkugjaldinum er tað greitt, tí tað er ein uppgerð og eitt gjald sum skal latast TAKS.

Viðvíkjandi rentuásetingini í § 3, stk. 4.
Taks mælir til at orðingin "Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu." verður sett afturat aftaná seinasta punktum. Tá krøv koma í innheintingarskipanina hjá Taks, so verður renta eisini roknað av rentu. Hetta er galdandi fyri øll krøv sum koma í innheintingarskipanina hjá Taks.

TAKS ynskir, at pantiheimildin skal orðast soleiðis:
§ 8. Avgjald, skattur og sekt, sum stava frá hesi løgtingslóg, og eru fallin til gjaldingar, kunnu saman við rentum og innkrevjingarkostnaði verða innheintað við panting.
Stk. 2. TAKS fremur pantingina eftir reglunum fyri innheinting av skattum, tó er § 7, stk. 1 í lov for Færøerne om inddrivelse af skatter og afgiter til det offentlige m.m. ikki galdandi.

Vinarliga

Poula á Líðarenda
Deildarstjóri
Tel. 35 26 80

TAKS

Postboks 2151, 110 Tórshavn
www.taks.fo, taks@taks.fo, tel. 35 26 00

Fyrivarni
Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævi, vinarliga sig mær frá og sletta brævið.